## *Endurlýsing*

Av tí at ov fáir umsøkjarar vóru, lýsa vit av nýggjum eftir

# Netumsitara

Netumsitarin hjá okkum fór í annað starv 1. januar 2001. Vit søkja tí eftir nýggjum netumsitara til NETumsitingina á Debesartrøð, sum hevur ábyrgd av eini fjølbroyttari netskipan, sum bindur saman 7 stovnar í 14 bygningum við tilsamans umleið 150 brúkarum.

**Netumsitarin skal :**

- hava umsjón við ryggnetinum (backbone) við tilhoyrandi netsamskiftisútgerð
- samskifta og samstarva við netábyrgdararnar á teimum 7 stovnunum
- umsita web-, ftp-, navna- og post-ambætararnar
- samskifta við veitarar av KT-útgerð sum heild
- svara fyrispurningum og leggja skeið-virksemi til rættis
- samskipa dagføringar, umleggingar og útbyggingar í netskipanini
- verða skrivari hjá netráðnum

**Vit ynskja:**
Umsøkjarar við hollari tekniskari útbúgving og kunnleika í teldutøkni, stýrisskipanum, teldunetum og teldusamskifti, hava fyrimun. Góð samstarvsevni og evni at arbeiða sjálvstøðugt eru ein treyt.

**Vit bjóða:**
Eitt avbjóðandi og sjálvstøðugt starv hjá NETumsitingini. Góðar eftirbúgvingarmøguleikar.

Setan skjótast til ber. Løn sambært avtalu millum Føroya Landsstýri og avvarandi yrkisfelag.

Meira fæst at vita við at venda sær til Anniku Sølvará, tlf. 315302, teldupostur annikas@setur.fo

Umsóknarfreistin er 29.1.2001. Umsóknir við ævilýsing (CV), avriti av prógvum og øðrum viðkomandi skjølum skulu sendast til

**Netráðið**
**Att. John Kjær, formaður**
**Setursskrivstovan**
**J.C. Svabos gøta 14**
**100 Tórshavn**

---

NETumsitingin er tænastustovnur, ið vegna netsamstarvið:

- hevur umsjón við, heldur við líka og samskipar útbyggingar av ryggnetinum (backbone) á Debesartrøð og tilknýtið til internetið, sum granskingar-, mentanar- og útbúgvingarstovnarnir nýta
- savnar vitan og fylgir við menningini innan netsamskifti, teld og teldnýtslu yvirhøvur
- veitir samstarvsstovnunum ráðgeving og hjálp í netsamskiftis- og telduspurningum
- skipar fyri møguligum felagskeypi av rit- og tólbúnaði, skipar fyri skeiðum, kunningarfundum og tílíkum.

Netumsitarin arbeiðir í tøttum samstarvi við netábyrgdararnar á hesum stovnunum, sum tilsamans mynda netsamstarvið: Fiskirannsóknarstovan, Fornminnissavnið, Fróðskaparsetrið, Heilsufrøðiliga Starvsstovan, Landsbókasavnið, Landsskjalasavnið og Náttúrugripasavnið.

Internet Sosialurin
www.sosialurin.fo

### TVINGSILSSØLA

**Hósdagin**
**tann 8. februar 2001**
**kl. 09.30**
verður á dómaraskrivstovuni, C. Pløyensgøtu 1, 100 Tórshavn, hildin tvingsilssøla yvir **matr. nr. 618 b, Toftir.**

Ognin er eini sethús til støddar 105,83 m² í kjallara- og stovuhædd, gjørd av timbri og betong og takt við aluminium. Kjallarahæddin er ikki innrættað. Í stovuhæddini er durur, gongd, wc, baðirúm, 3 kømur, stova, køkur, hjallur og trappurúm. Grundøkið er 915 m² til støddar.

Sølan er umbiðin av **Ólavur Jákup Kristoffersen, advokati, Fr. Petersensgøtu 9, Tórshavn, tlf. 311145 (j.nr. 20000539)**, sum kann geva nærri upplýsingar, og sum nærri avtala kann gerast við, um ynskt verður at síggja ognina.

**Føroya Fútarættur,**
tann 8. jan. 2001

### TVINGSILSSØLA

**Hósdagin**
**tann 8. februar 2001**
**kl. 09.15**
verður á dómaraskrivstovuni, C. Pløyensgøtu 1, 100 Tórshavn, hildin tvingsilssøla yvir **matr. nr. 561, Tvøroyri.**

Ognin er eini sethús til støddar 120 m² í kjallara- og stovuhædd, gjørd av timbri og betong og takt við pappi. Í kjallarahæddini er gongd, verkstaður, handil, wc, kontór, kjallararúm og fýrrúm. Í stovuhæddini er gongd, køkur, bryggers, stova, 2 kømur, baðirúm og hjúnarrúm við baðirúmi. Grundøkið er 1579 m² til støddar, harav vegur er 74 m².

Sølan er umbiðin av **Ólavur Jákup Kristoffersen, advokati, Fr. Petersensgøtu 9, Tórshavn, tlf. 311145 (j.nr. 20000527)**, sum kann geva nærri upplýsingar, og sum nærri avtala kann gerast við, um ynskt verður at síggja ognina.

**Føroya Fútarættur,**
tann 8. jan. 2001

### TVINGSILSSØLA

**Hósdagin**
**tann 8. februar 2001**
**kl. 09.00**
verður á dómaraskrivstovuni, C. Pløyensgøtu 1, 100 Tórshavn, hildin tvingsilssøla yvir **matr. nr. 440 f, Toftir.**

Ognin er eini sethús til støddar 60,88 m² í stovu- og loftshædd, gjørd av timbri og betong og takt við pappi. Í stovuhæddini er durur, trappa upp á loft, vásakøkur, køkur, stova, kamar og wc. Á loftinum eru tvey kømur og baðiverilsi. Grundøkið er 604 m² til støddar.

Sølan er umbiðin av **Ólavur Jákup Kristoffersen, advokati, Fr. Petersensgøtu 9, Tórshavn, tlf. 311145 (j.nr. 20000540)**, sum kann geva nærri upplýsingar, og sum nærri avtala kann gerast við, um ynskt verður at síggja ognina.

**Føroya Fútarættur,**
tann 8. jan. 2001

www.wenzel.fo
Ford






## Lastbilur til sølu



**Merki: Nissan Eco-T v/krana**
**Árgangur 1997**
**Km. 70.000**
**6 tons totalvekt**
**Prísuppskot kr. 170.000,- v/MVG**

**P/F Meinhardt Arge**






### DAGSTOVNURIN Á ARGJUM

# Pedagogur

**til føroysk-teknmálsstovuna**
**á Dagstovninum á Argjum**

Søkt verður eftir einum 35 tímars pedagogi til serøki á Dagstovninum á Argjum.

Starvið verður sett 1. februar 2001 ella eftir nærri avtalu.

Starvið er fyribils játtað til 31.12.01.

Dagstovnurin á Argjum er ein sjálvsognarstovnur. Á stovninum ganga 70 børn og samanlagt eru vit 18 starvsfólk.
Á stovninum eru 2 vøggustovur og 4 barnagarðsstovur, har tann eina er føroysk-teknmálastova, har vit samskipa deyv og tunghoyrd og hoyrandi børn. Á hvørjari stovu ganga 12 børn, á serstovuni 10 børn.

Tey, ið hava kunnleika til teknmál og vitan um deyv og tunghoyrd hava fyrimun.

Vit ynskja, at tú saman við okkum skapar eitt umhvørvi fyri børnunum, har tey kunnu trívast og mennast. Somuleiðis, at tú ert nýhugsandi og hevur ábyrgdarkenslu. Harumframt ynskja vit, at tú ert virkin á stovninum við atliti at víðarimenning av hesum.

Lønar- og setanarviðurskifti eru sambært sáttmálanum millum Føroya Pedagogfelag og Føroya Landsstýri.

Ynskir tú at vita meira um starvið, kann tú seta teg í samband við Gudrun W. Rasmussen, leiðara á tlf. 319019.

Umsóknin skal sendast til Dagstovnin á Argjum í seinasta lagi 22. januar 2001.

# Gomul sethús í Mikladali til sølu

Ognin er ávikavist eitt neyst ca. 26 m2 og eini sethús 44 m2, í kjallara, stovu- og loftshædd, gjørd av timbri og beton og takt við zink. Í kjallaranum er kamar, stórt rúm og eitt lítið brúsurúm við wc. Í miðhæddini er gongd, trappa upp á loft, køkur, stova og eitt lítið kamar. Úr køkinum er niðurgongd í kjallaran. Á loftinum er hjúnarúm, tvey smærri kømur og eitt lítið baðiverilsi við wc, vaski og baðikari. Húsini hava eisini ein útbygning.

Áhugað kunnu venda sær til

**Húsalánsgrunnin,**
tlf. 314583

# Handilsinnbúgv til sølu

Kølara, frystara, kassadiskur, hillar, ljósarmatur. o.a.

**Tlf. 214005**

# Endurlýsing eftir LEIÐARA til Dagstovnin í Kvívík

Vegna ov fáar umsóknir søkir Kvívíkar Kommuna av nýggjum eftir leiðara til Dagstovnin í Kvívík til setan 1. apríl 2001 ella eftir nærri avtalu. Starvið er fulltíðarstarv.

Undir Dagstovninum í Kvívík eru vøggustova til 10 børn, barnagarður til 20 børn, skúlaskipan til 10 børn og frá 1. januar 2001 eisini dagrøkt, har tað í løtuni eru 3 børn.

**Leiðarin**
Vit sóknast eftir leiðara, sum:

- hevur útbúgving sum pedagogur
- hevur royndir á økinum
- á námsfrøðiligan hátt kann virka fyri at útinna lógarásettu uppgávuna hjá dagstovninum at menna, menta og hava umsorgan fyri børnunum í tryggum umhvørvi
- hevur hug og vilja at seta sín dám á endamálsorðingina fyri stovnin
- er opin fyri nýhugsan
- í samstarvi við bygdarráð og foreldur kann vera viðvirkandi til at fylla út karmarnar um ansingarskipanina í kommununi
- hevur góð samstarvsevnir

**Kommunan kann bjóða**
Eitt spennandi og avbjóðandi starv. Leiðarin verður við til at skapa karmarnar á ansingarøkinum, sum hevur stóran týdning fyri kommununa. Løn sambært sáttmála millum Føroya Landsstýri og Føroya Pedagogfelag.

Møguleiki er fyri, at starvsøkið kann verða víðkað /broytt innan fyri ásettu karmarnar í lógini.

Umsóknir saman við avriti av prógvum, CV o.ø. skulu sendast til:

**Kvívíkar Kommunu**
FO-340 Kvívík

og vera kommunuskrivstovuni í hendi seinast mánadagin 15. februar 2001.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til bygdarráðsformannin, Heina Holm, tlf. 421294 ella 210294.

# Innskriving av næmingum

til 1. flokk komandi skúlaár verður í skúlanum mánadagin 15. jan. kl. 13.00.

Havið dóps- ella navnaseðil við.

**Stranda skúli**
**Tlf. 447955**

Sosialurin

# Sjúklingavegleiðari til Sjúklingahotellið Tórshavn

Søkt verður eftir einari sjúkrasystir til nýtt starv sum sjúklingavegleiðari á Sjúklingahotellinum til setan 1. mars 2001.
Arbeiðstíðin er 30 tímar um vikuna , frí vikuskifti og halgidagar.

Sjúklingahotellið Tórshavn er ein stovnur undir Almanna- og heilsumálastýrinum.
Hotellið hýsir sjúklingum, ið eru til kanningar og viðgerðar í Keypmannahavn, og avvarðandi teirra.

Uppgávan hjá Sjúklingavegleiðaranum verður í høvuðsheitum at hækka góðskustøðið og menna tænastustøðið hjá sjúklingunum. Vegleiðarin skal eisini menna samstarvið millum sjúklingahotellið og viðgerðarstøðini.
Størsti parturin av arbeiðinum verður úti á viðgerðarstøðum í Keypmannahavn, vegleiðarin hevur tó tilhaldsstað á Sjúklingahotellinum.
Starvs- og arbeiðslýsing fæst við at venda til Sjúklingahotellið Tórshavn.

Vit søkja ein sjúklingavegleiðara sum:

- hevur sjúkrasystraútbúgving við góðkenning frá danska Heilsustýrinum
- skrivar og tosar føroysk
- hevur kunnleika til føroyska og danska sjúkrahúsverkið
- hevur breiðan og hollan kunnleika innan sjúkrarøkt
- er før fyri at arbeiða sjálvstøðugt og før fyri sjálv at leita sær arbeiðsuppgávur
- hevur góð evnir at samstarva
- hevur kunnleika til góðskumenning, skjalfesting og standardir
- kann nýta EDV sum arbeiðsamboð

Við at venda sær til leiðaran Ina Frisdahl tlf. nr. +45 77 33 64 64, fæst nærri kunning um starvið.

Lønar- og setanartreytir verða sambært sáttmála millum DSR og Keypmannahavnar Kommunu.

Umsókn við avritum av relevantum prógvum verða at senda til:
Sjúklingahotellið Tórshavn
Tåsingegade 29 4. sal
2100 København Ø
Mrk. Sjúklingavegleiðari

Umsóknarfreist: 24/1 2001 kl. 11.00.

# Takk

Øllum tykkum, sum á ein ella annan hátt hava stuðlað arbeið okkara í farna ári, senda vit eina hjartans tøkk við ynskjum um eitt av Harranum signað nýggjár.

**Herberg Frelsunarhersins**

FRAGD & FIMI
Tað besta tú kanst bjóða tær sjálvum